
Oljumálaráðharrin í Katar, Abdullah Bin Hamad Al-Attiyah. Mynd: EPA/MAURIZIO GAMBARINI

# OPEC-leiðari vil hava Noreg at framleiða minni av olju

**Jógvan Hugo Gardar**

24.11.2014 - 09:06

Oljan.fo

Fyrrverandi oljumálaráðharrin í Katar, Abdullah Bin Hamad Al-Attiyah, ynskir at Noreg minkar um sína oljuframleiðslu, nú oljuprísurin er tann lægsti vit hava sæð farnu trý árini.

- Tíðin er farin frá at OPEC-londini einsamøll avgerða hvussu nógv olja sum skal pummpast upp, sigur hann, sambært NRK.

OPEC-londini fara á fund 27. november, og spenningur er knýttur til hvat tey fara at semjast um, ella um tey koma til nakra semju, og hvussu hetta kann ávirka oljuprísin. Higartil hevur størsta landið í OPEC, Saudi-Arabia, einki gjørt fyri at fáa oljuprísin at

hækka aftur. Spurningurin er hvussu leingi Saudi-Arabia kann lata oljuprísin lækka, og hvussu leingi hini OPEC-londini hava ráð til at prísurin er á dagsins prísstøði.